# ítróttur

Nr. 149 • týsdagur • 9. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo



Eingin fótbóltur sunnudagar s. 26


# KÍ møtti ikki upp

**Tað luktar hálvavegna av gølu í aðru deild, eftir at KÍ ikki fekk mannað lið til útidystin móti AB**

EINGIN DYSTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Summarfestivalur var í Klaksvík um vikuskiftið, og ein av avleiðingunum av hesum tykist vera, at KÍ hevði trupulleikar at manna lið, tá aðrudeildarliðið hjá felagnum skuldi á vitjan hjá AB.

Har høvdu menn annars í eina viku fyrireikað seg til dystin, men fríggjakvøldið kom fax frá KÍ, har boðað varð frá, at teir ikki fingu mannað lið til dystin.

- Hetta kann eg slettis ikki góðtaka. Vit hava brúkt eina heila viku til at fyrireika okkum til dystin, og so kemur eitt fax fríggjakvøldið, har avboð verður givið. Hetta er bara nakað, sum ikki eigur at koma fyri í aðru deild, sigur AB-venjarin, Kári Reynheim, ið sum vera man er alt annað enn glaður um støðuna.



*- Hetta kann eg slettis ikki góðtaka. Vit hava brúkt eina heila viku til at fyrireika okkum til dystin, og so kemur eitt fax fríggjakvøldið, har avboð verður givið. Hetta er bara nakað, sum ikki eigur at koma fyri í aðru deild, sigur AB-venjarin, Kári Reynheim*

Og umberingarnar hjá KÍ tóktist AB-venjarin eisini geva lítið fyri.

- Í fyrsta lagi siga teir, at summarfestivalurin gjørdi, at tað var trupult at fáa fólk. Vit hava eisini leikarar, sum skuldu á festival, men fyri tað ætlaðu vit at spæla dyst leygardagin. Og so tosaðu teir eisini um, at teir høvdu so nógvar skaðar og leikbann í fyrstu deild, og at teir tí mangladu nakað av fólki. Vit hava so eisini havt bæði skaðar og leikbann, men so mugu vit bara niður á fjórðudeildarliðið eftir fólki. Tað eru spælireglurnar, og so er tann søgan ikki longri.

Og tað er einki at ivast í, at støðan hjá AB kann gerast heilt keðilig, um illa vil til. Í løtuni er talan um eitt sera tætt oddastríð í aðru deild, og tað er ikki óhugsandi, at málmunurin kann gerast avgerandi fyri endaligu støðuna í deildini. Her stendur AB seg í løtuni ringast av oddaliðunum, og tí vildi ein – kanska – trivaligur á KÍ ivaleyst komið væl við.

Men hetta eru tó bert hypotesur, og Kári Reynheim vil heldur ikki gera nakrar viðmerkingar til tann partin.

- Hasin dysturin er av fyri mítt viðkomandi. Vit hava útidyst í Hvalba næsta vikuskiftið, og tað er tað, sum eg fyrireiki meg til. Men eg haldi framvegis, at hetta yvirhøvur ikki kann góðtakast, og kappingarnevndin eigur at skera ígjøngum í málinum, soleiðis at KÍ verður revsað, staðfestir AB-venjarin at enda.

Og kappingarnevndin fer so eisini at hava fund um málið, men enn ber tó ikki til at siga, hvat úrslitið av hesum fundi verður.

- Málið er enn ikki viðgjørt, og tí fái eg ikki sagt, hvørja støðu vit taka, sigur varaformaðurin í kappingarnevndini, Niklas á Líðarenda.

- Men talan er í øllum førum um eitt álvarsligt mál, sum vit fara at viðgera bæði væl og virðiliga. Sjálvur minnist eg ikki, nær trupulleikar hava verið av hesum í aðru deild, men í triðju deild eru slík mál fyrr komin fyri, sigur varaformaðurin at enda.

Sambært kappingarreglunum, so er tó greitt, at kappingarnevndin kann revsa KÍ fyri tilburðin. Grein 12, stk. 2 í reglunum staðfestir, at »Møtir lið uttan haldgóða orsøk ikki til ein ella fleiri dystir í lands- og steypakappingini, kann liðið verða koyrt úr kappingini. Kappingarnevndin ger annars úrskurð um, hvørjar avleiðingar hetta skal hava fyri viðkomandi felag, herundir um viðkomandi felag kemur undir sekt, og hvørjar avmarkingar sklu verða galdandi fyri luttøku hjá viðkomandi felag í komandi kappingarári«

Soleiðis er næst besta liðið hjá KÍ í løtuni í vanda fyri at verða koyrt úr kappingini, og tað er einki at ivast í, at hetta vildi verið mest sum skomm fyri felagið, sum stendur fyri 100 ára degnum í næstum.

*Varaformaðurin í kappingarnevndini, Niklas á Líðarenda, sigur, at talan er um eitt álvarsligt mál, sum nevndin fer at viðgera væl og virðiliga*





# Tindurin og botnurin síggjast sólarklárir

**Hóast uppgávan var torfør, so styrkti HB um sína støðu í toppinum, meðan tað í botninum hjá B68 sær uppaftur svartari út**



*Tað tykist alt annað enn veruleikafjart, at HB kann hava nógv at lora av, tá teir í seinasta umfarinum fara á vitjan í Runavík*

12. UMFAR SAMANUM

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tveir triðingar av hesum kappingarárinum eru nú lagdir afturum. Tólv umfør eru avgreidd, og um hálvan annan mánað er hetta fótbóltsárið vorðið søga. Leygardagin 2. oktober er átjanda og síðsta umfarið á skránni.

Í góðveðrinum, sum var mesta partin av síðstu viku og eisini var sunnudagin, var sýnið sera gott. Tað sást heilt langt. Serliga hjá teimum, sum høvdu leitað sær niðan á tindar og toppar.

Soleiðis tykist tað eisini at vera í fótbóltskappingini. Eingin ivi tykist vera um, at tað verður HB, sum verður føroyameistari. Oddaliðið var í Vági, og tað gekk sum eftir ánni. Tað var leingi tætt, men eftir lítlari løtu í 2. hálvleiki koppaði tað útiliðnum til fyrimunar. Teir skoraðu tvey mál, og harvið høvdu teir fyri aðru ferð á rað vunnið í Vági. Tað man vera langt síðani, at teir síðst hava vunnið tvær ferðir upp í slag á Vágseiði. Men tað boðar frá klassa, og í HB eiga teir meiri enn at hóma teir 2. oktober í havsbrúnni. Tá skulu teir spæla í Runavík, og hóast tann uppgávan onkra ferðina hevur kenst rættuliga stór hjá HB, so fara teir ivaleyst at hava eitt sindur at geva út av undan síðsta umfarinum.

Støðan hjá oddaliðnum styrknaði eisini, tí teir næstu ikki megnaðu at fylgja við. Tá ið tað vóru 21 stig eftir at spæla um, var B36 fimm stig aftanfyri HB. Nú eru átjan stig at spæla um, og nú er B36 átta stig aftanfyri HB. Tað skal vilja verri enn illa til hjá HB, um teir ikki fara at fáa triðja settið av gullkrónum í trý ár.

Felags eyðkenni fyri øll hini liðini er, at tey ikki hava verið so støðug, sum teir á oddaliðnum hava verið. Mest støðugir hava teir á Skála verið. At tað kiksaði hjá teimum í heimadystinum ímóti EB/Streymi undan summarsteðginum var dýrur smeitur í FM stríðnum. Skálamenn undirstrika framvegis, at teir ikki hugsa so nógv um meistaraskap og heiðursmerki, men at teir taka eina uppgávu í senn, og at tað so fer at vísa seg, hvussu langt tað fer at røkka. Tað er longu greitt, at teir fara at fáa størri úrtøku, enn teir nakrantíð áður hava fingið, og tað er heilt nógv, sum bendir á, at teir fara at fáa fyrstu settini av heiðurskrónum.

Gøtumenn hava lagt bragdliga fyri. Í triðja umfarinum steðgaði góða gongdin, sum teir høvdu havt, tá ið teir taptu á heimavølli ímóti B36. Hesa ferð søgdu teir takk fyri seinast við at vinna í Gundadali. Eftir níggju stig í trimum teimum fyrstu royndunum eftir summarsteðgin tykist greitt, at tað vera Skála, GÍ og B36, sum fara at kappast um silvur og bronsu. VB misti aftur hesa ferð alt á heimavølli, og hóast NSÍ vann stórsigur á Svangaskarði, so tykist tað ikki skula gerast veruleiki, at teir skulu koma afturíaftur í heiðursmerkjastríðnum. Men tað kann kortini fara at vísa seg.

## Kreppan

Í trimum feløgum verður hugsað meiri um botnin og niðurflyting, enn tað verður aðra staðni. Ringast stendur til á Toftum, har B68 sunnudagin ikki gav ábendingar um, at støðan er batnað nakað serligt, hóast fleiri nýggir spælarar eru komnir afturat seinastu vikurnar.

ÍF er næstniðast, men um úrslitini seinastu vikuna verða nýtt sum grundarlag at meta út frá, so eru teir betri fyri, enn B68 er tað. Mánakvøldið í síðstu viku vann ÍF 2-1 í Runavík, og sunnudagin vann NSÍ 5-0 á Toftum.

KÍ er ikki beinleiðis í vanda fyri at flyta niður. 4-0 tapið á Eiði vísti, at støðan er katastrofal, nú felagið um eina viku fer at fylla hundrað ár. KÍ fekk fyri tveimum vikum síðani eitt stig á Svangaskarði, og tað tykist ikki sum um, at teir skulu fáa nakað stig afturat. Í hvussu so er ikki, um hugburður og avriki ikki fara at vera av heilt øðrum slagi, enn tey hava verið seinastu ferðirnar. Um klaksvíkingar ikki skulu enda á næstaftasta plássinum, so verður tað, tí ÍF ikki fer at fáa seks stig afturat.

## Nógv kort

Tólvta umfarið var eyðkent av, at tað vóru so nógvar útvísingar. Í Gundadali misti B36 málverjan orsaka av regluni um, at málverjin eisini er fevndur av regluni um neyðbremsu. Í altjóða høpi hevur verið tosað um, at henda reglan átti at havt verið broytt.

Í Fuglafirði og í Vági fingu spælarar reyða kortið, tí teir tvær ferðir høvdu sæð gult. Á Toftum var beinleiðis reytt kort í luftini. Aftur hesa ferð varð staðfest, at dómararnir hava gjørt av, at teir ikki tíma at leggja oyru til hvat sum helst.

Trettanda umfarið verður á skránni sunnudagin. Frammanundan tí er landsdystur á skránni. Hann verður ímóti Malta mikukvøldið.

HB er á tindinum, og tað verður skjótt, at teir fara at hava vunnið FM heitið. B68 er niðast í dalinum, og tað skal nógv broytast, um teir skulu sleppa av aftasta plássinum.


## Prekvalifisering

### El-arbeiði í Norðoyatunlinum

Áhugaðir arbeiðstakarar verða við hesum bodnir at vísa áhuga at vera við í avmarkaðari útbjóðing av el-arbeiði í Norðoyatunlinum.

Prekvalifikatiónstilfarið fæst við at venda sær til skrivstovu okkara á adressuni niðanfyri, ella við at senda teldupost til hl@tunnil.fo

Freistin at lata inn umbidnu upplýsingarnar er 16. september 2004.



NORÐOYATUNNILIN

Norðoyatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postsmoga 1010 · 110 Tórshavn
Tel 350200 · Faks 350201 · www.tunnil.fo

SANSIR TEL 355355